**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á væl? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara
Vit eru til reiðar!

**Telefon 118 20 · Telefax 147 20**

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran

**Telefon 118 20 · Telefax 147 20**

## veðrið

Kalt hættarrák verður næstu dagarnar móti Føroyum. Lágtrýstið, sum væntandi tekur seg upp yvir Suðurgrønlandi ferð-ast helst eysturyvir Føroyar og dýpist.

Leygardagin



Upp í friskt lot, 10 m/s, millum landsynning og útsynning, ódrigið og kavaælingur, men annars tolu-ligt ella gott sýni. Hitin uml. á frostmarkinum.

Sunnudagin

Strukur í vindi upp í skrið, 13-18 m/s, av suðri og útsynningi, ódrigið, regn í skiftum, men annars helst toluligt sýni. Hitin uml. 5 stig. Út á kvøldið skrið ella stormur, 20-25 m/s, av útnyrðingi og norði, kavaælingur, men annars gott sýni. Hitin niður í 2 kuldastig.

Mánadagin, týsdagin og mikudagin

At byrja við skrið ella stormur, 20-25 m/s, av útnyrðingi, men líðandi minkandi niður í friskt lot, 10 m/s, lutvíst ódrigið og hending kava- ella heglingsæl, men annars gott sýni. Hitin úr tveimum kuldastigum upp í 2 stig.

## óli teknar

*Undirgraving*



*– Vit byta hana millum okkum. Eg fái tunnlarnar og Olaf oljuna*

Fólkaflokkurin krevur, at Svend Age skal umsita undirgrundina

# Minni dálking enn væntað

Hóast oljudálkingin í Hetlandi aftaná at tangaskipið Braer fór á land vestanfyri Sumburghead herfyri var lemjandi stór, so høvdu hetlendingar roknað við, at hon fór at vera uppaftur verri. Tað tað vísir seg, at ringa veðrið seinastu tíðina hevur hjálpt væl til at spjaða oljuna og reka hana burtur frá Hetlandi.

Men umhvørvisfelagsskapir rokna við, at hetlendingar í mong ár framyvir fara at merkja hesa vanlukku.

Atli Dam, fyrrverandi løgmaður sendi beint eftir hendingina eitt samhuga fjarrit til hetlendska ráðið. Og hann bjóðaði føroyingar fram, um vit kundu hjálpt við nøkrum.

jústinus

# Óheppið mistak

Í greinini fríggjadagin komu vit at gera Áka Mouritsen skammiligan órætt. Í greinini stóð at "Málingahandilin er ein familjufyritøka, sum Andrias Mouritsen saman við synunum Eyðun, Áka og Finnbjørn stovnaði. Nú er bara Finnbjørn eftir á lívi....

Hetta er ikki rætt, Áki er spilllivandi, meðan Eyðun og Arnbjørn eru deyðir. Áki arbeiðir ikki longur í Málingahandlinum, men situr framvegis í nevndini. Vit biðja Áka um at umbera okkum mistakið.

jústinus

**Trupulleikar av MVG-Skipanini?**

Hava tygum trupulleikar av:
**MVG-Uppgerð**
**Bokhaldi**
**Incasso** (debitor rokt)
**Ráðgeving**
**Skattauppgerð**
ella øðrum
**Roknskaparararbeiði**

er virki okkara ført fyri at loysa teir bæði skjótt og væl – *og biliga!*

**Rann Teld**
v. Atla Klein Olsen
Postboks 205
110 Tórshavn
Fax: 18703
Tlf. 18903 – 88903

**HAVNAR TAXI**
**Tel. 88100**

## Vestfalskyrrindi

**22. januar: Tendring**
**26. januar: Mánin longst frá jørðini**

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. jan. | 0707 | 1928 | 0907 | 2128 | 0522 | 1743 | 0722 | 1943 | 0607 | 1828 | 0622 | 1843 |
| 24. jan. | 0748 | 2009 | 0948 | 2209 | 0603 | 1824 | 0803 | 2024 | 0648 | 1909 | 0703 | 1924 |
| 25. jan. | 0828 | 2048 | 1028 | 2248 | 0643 | 1903 | 0843 | 2103 | 0728 | 1948 | 0743 | 2003 |
| 26. jan. | 0908 | 2129 | 1108 | 2329 | 0723 | 1944 | 0923 | 2144 | 0808 | 2029 | 0823 | 2044 |